


www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 11 - 2011

# So rennur russiskt gass ígjøgnum Eystrasalt

Tann 1.234 kilometrar langa gassleiðingin Nord Stream, sum flytur russiskt gass til Týsklands eftir botninum í Eystrasalti, varð tikin í nýtslu í dag. Millum tey hjástøddu vóru russiski forsetin, Dmitrij Medvedev, og týski kanslarin, Angela Merkel. Gassleiðingin er lýst sum eitt stórverk í verkfrøðingaeygum, men hon hevur eisini kostað 50 milliardir krónur. Verða so íløgurnar uppi á landi lagdar omaná, er talan um fleiri hundrað milliardir. Teir nógvu pengarnir skulu tryggja, at evropear fáa tann neyðuga hitan, og at ídnaðurin í Evropa fær nóg mikið av gassi til sína framleiðslu. Danmark hevur ikki havt fyri neyðini at keypa útlendskt gass síðani 1982, men nú er ikki nógv gass eftir í teimum donsku goymslunum. Danir skulu ikki hava gass ígjøgnum Nord Stream nú, men í prinsippinum kunnu teir fáa gass tann vegin longu í næstu viku, sigur Torben Brabo, sum er marknaðarstjóri hjá Energinet, ið stendur fyri gass- og elveiting í Danmark. Tað risastóra russiska orkufelagið Gazprom eigur 51 prosent av Nord Stream-leiðingini, og fleiri vesturlendsk feløg eiga hin partin. Hugskotið um at leiða russiskt gass til Týsklands og haðani út kring Evropa hevur ikki fingið líka góða undirtøku allastaðni, tí fleiri stúra fyri, at russar fara at brúka gassið til at leggja trýst á Evropa, um ella tá teir halda seg hava orsøk til tað. Torben Brabo er tó ikki so stúrin. . "Russland hevur brúk fyri inntøkunum, sum ríkiskassin í Moskva fær burtur úr at selja Evropa gassið", sigur hann. ?


ORG
RUSLAND